# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hótta grønlendingar

Tað er eingin lóg, sum forðar føroyskum og grønlendskum fólkatingslimum at leggja seg út í danskan innanríkispolitikk. Tað er heldur ikki heilt satt, tá eitt nú danskir stjórnarflokkar vilja vera við, at norðuratlantisku fólkatingslimirnir ongantíð hava lagt seg út í trætur millum stjórn og andstøðu á fólkatingi. Hetta er ofta hent seinastu fimti árini, og hetta er mest hent á tann hátt, at eitt nú ein føroyskur fólkatingslimur boðar frá, at hann ikki atkvøður í máli av serstøkum týdningi fyri stjórnina. Fleiri dømi eru um hetta. Annað dømi er, at ein føroyskur fólkatingslimur boðar frá, at hann ikki fer at fella hesa ella hasa stjórnina. Hetta er at leggja seg um ikki beinleiðis so óbeinleiðis út í danskan innlendispolitikk. Siðvenjan er sostatt ikki fastari enn so.

Tað er tí undir alt sømiligt mark og átaluvert, at framsøgufólkini hjá ávikavist teimum konservativu og danska fólkaflokkinum beinleiðis í donsku pressuni hótta grønlendingar. Teir verða hóttir bæði við niðurskurði í blokkinum og við sjálvstýrisnevndini, sum er um at leggja síðstu hondina á sítt álit. Hetta er púra óhoyrt og eigur undir ongum umstøðum at verða góðtikið. Tær hóttanir, sum alment eru settar fram, eru danska fólkaræðinum til lítlan sóma, og vónandi fara grønlendingar ikki at lata seg ræða. Lat tað eisini verða sagt her, at tað hevði sømt seg føroysku fólkatingslimunum at verið við í hesum tiltaki.

Hetta mál er einki vanligt politiskt mál, men hetta snýr seg um at geva børnunum á donsku asyldeplunum sømilig kor. Tað er vorðið vísindaliga prógvað, at tey mongu børn av foreldrum, sum hava søkt politiskt friðskjól í Dammark, líða álvarsliga undir uppihaldi á asyldeplunum. Her eru tey stúvað saman sum sild í tunnu og liva undir umstøðum, sum ongin danskur myndugleiki vildi boðið eitt nú donskum børnum. Børnini á hesum deplum gerast sjúk til likams og sálar, og alt hetta mál er stór og vanærilig skomm fyri Danmark, sum annars roknast sum undangonguland til demokrati og mannarættindi. Tað er tí alla æru vert, at grønlendingar atkvøða við andstøðuni móti stjórnini við tí góðu grundgeving, at her er talan um at bøta um umstøðurnar hjá børnum í neyð.

**Sosialurin**

## Hvat nú?

RANDI VANG

Rætt er, at sitandi løgmaður hevur eftir eitt løgtingsval mandat til at skipa samgongu - so bert hann dugir at snúgva sær, nøkta meiri ella minni tørvin hjá hinum samgonguflokkunum og sleppur undan misáliti frá meirilutanum á tingi, kann hann í ástøðinum sita til ellisár.

Eitt Føroyamodell, lívlangt stjórnarræði – í mínari verð er tað ikki heilt burturvið, tí ein kann hugsað um hetta sum eitt slag av "demokratiskum einaræði", har fólkið í grundini onga orsøk hevur at fara á val, tí at hvussu so víkur og vendir, so fer ABC-samgongan kanska ONGANTÍÐ at missa meirilutan.

Í veruleikanum er tað so, at veljarin onga ávirkan hevur á samgongusamráðingarnar, soleiðis sum støðan er nú, og veljarin kann tí bert bíða við undran, og staðfesta at atkvøðan hjá øllum borgararnum ikki hevur sama virði.

Hesin sami trupulleiki gjørdi seg eisini galdandi við seinasta løgtingsval í 2004, hóast ongin løgmaður var tá, tí at Anfinn Kallsberg var farin frá frammanundan. Tá var tað so, at eftir valið skuldu teir nýkosnu tinglimirnir velja, hvønn flokk á tingi teir vildu hava at skipa samgongu. Hóast Tjóðveldisflokkurin tá eisini hevði størsta tingmannatal, fekk Javnaðarflokkurin atkvøðurnar frá sær sjálvum umframt Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum at skipa samgongu, t.e. 21 tilsamans, meðan andstøðan hevði 11. Til hetta kundi onkur sagt, at tingið umboðar jú fólkið, og tí var tað eins og við samgongusamráðingarnar í 2008 demokratiskt rætt. Tað er tað eisini á ein hátt. Men tað skerst ikki burtur, at tað at skipa samgongu er so ógvuliga subjektivt og nakað, ið veljarin als onga ávirkan hevur á, tí at møguleikarnir fyri at skipa samgongu eru so nógvir, ikki minst hesu ferð, tí at smáu flokkarnir eru tað størri nú. Onkrir samgongulimir vilja kanska eina aðra samgongu, men tora ikki ella vilja vísa trúfesti móti tí verandi.

Tí haldi eg, at tað fyri veljaran, fyri fólkið, er rættari, at størsti flokkur á tingi (um fleiri hava líka nógvar tinglimir, so størsti flokkur prosentvíst) fær rætt at royna at skipa samgongu. Veljarin fær tá størstu ávirkan á eina møguliga samgongu. Onkur kundi svarað hesum við at sagt, at eisini í hesari støðu er tað soleiðis, at sjálvt størsti flokkur á tingi kann tilvildarliga og subjektivt skipa samgongu, og tað er sum so rætt.

Tann avgerandi munurin er tó, at tað við hesum LOYSIR SEG HJÁ VELJARANUM AT FARA Á VAL, tí at tann flokkurin, ið flest fólk velja, fær fyrst og fremst rættin at skipa samgongu, heldur enn at ónatúrliga breiðar samgongur sum tann núverandi í veruleikanum kann gera, sum henni lystir, og veljarin hevur lítla og onga ávirkan.

Havi mangan hugsað, tá ið fólk siga, at tað var so øgiligt rumbul, tá ið fullveldislandsstýrið sat við valdið, tað kann vera, men í grundini hevur verið minst líka so nógv rumbul nú. Tó munurin og vansin við ónatúrliga breiðum samgongum er, at TAÐ FÆR ONGAR AVLEIÐINGAR. Tað er stutt og greitt ikki rætt at skipa samgongur eftir hesum leisti, tí somu persónar og flokkar kunnu sita alt ov leingi saman, og tað er neyvan demokratiskt. Annar møguleiki er, at veljarin framman undan fær at vita hvørjir flokkar longu framman undan valinum hava avtalað at halda saman, uttan mun til meiri ella minni væleydnað valúrslit.

## Kommunan, vit og umhvørvi !

JÓGVAN ELIS DANIELSEN
Hvalba

Í hesum tíðum verður tosað og skrivað nógv um umhvørvi. Tíbetur verður eisini gjørt nógv fyri, at naturan skal verða varðveitt fyri okkara eftirkomarum. Runt heimin eru flestu raknað við, og øll meta at týdningarmikið er at okkurt verður gjørt beinanvegin. Eg hugsi eisini at politikkarar síggja at nakrar atkvøður eru at vinna í hesum.

Men vit vita, at langt er eftir á mál, tí Harrin gav okkum ikki hesa vøkru verð, í teirri meining at hon skuldi oyðast við kríggj, óndskapi ella dálking.

Tað gleðir meg at síggja, hvussu vøkur og vælhildin tey eldru húsini niðri á Reyni og Bakkahellu eru vorðin, eftir at tey eru umvæld. Men vandi er altíð í vælferð. “Elisabeth Minde”, ið kendi havnaðurin Jakku Danielsen bygdi í 1938, sum var eitt satt prýði í mong ár, men sum sær út, sum hon ongan góðan eigur. Og sama er við hjallinum, sum stendur við E.M., sum Christian Didriksen átti í sínu tíð. Hetta er eitt vónbrot at síggja. Hetta skuldi kommunan gjørt nakað við, um eigararnir ikki kunnu finna útav tí.

Eg vil bert nevna eitt dømi afturat, av fleiri. Húsini í Bringsnagøtu, “Í Fjósi” , har krambúðin hjá Villa Simonsen lá, seinni Magnus Bærentsen, og har Brugsan av fyrstan tíð, sá dagsins ljós, eftir kríggið. Og í hinum endanum av húsinum, nærri Skansastovu, eitt skraddarapar (úr Nólsoy ?). Í hinum endanum hevði Fía í Smiðjustovu handil við toy. Húsini “í Fjósi” blivu flutt, helst áðrenn 1938, niðan á Gripsveg, har Kamilla í Fjósi og Hans búgva í teimum.

Eg fari at spyrja Kommununa og tey ella tann, ið hava ábyrgdina av býnum, og hvørjum standi hann er í, um tit vilja kennast við hetta? Hetta hevur jú sæð soleiðis út í mong ár, og er ikki nøkur vøkur sjón fyri ferðafólk.

Eg vil eisini í hesum sambandi, nú umhvørvi er í hásæti, heita á Tvøroyrar Kommunu, um tað ikki hevði verið eitt gott hugskot, um at tað bleiv rudda í Trongisvági, ávegis til Hvalba. Hetta er als ikki nakað prýði fyri ferðafólk heldur.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:**
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersenn niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.